Jesus, um teg vil eg syngja,
E dur - gis

1/5.
E H
Jesus, um teg vil eg syngja,
H7 E
tú, sum úr leinkjum meg loysti,
E E7 A
tú, sum av deyða meg reisti,
E H7 E
lær meg at syngja um teg.

2/5. Nú eru bondini slitin,
Jesus nú býr mær í hjarta,
horvin er náttin hin svarta,
Jesus er ljós mítt og lív.

3/5. Við míni hørpu eg siti,
glaður í veingjanna skugga,
fyrr kundi einki meg ugga,
nú hevur hjarta mítt frið.

4/5. Nú kann eg Jesusi lova,
nú kann mín sál honum prísa,
hjarta mítt ynskir at vísa,
øðrum hans kærleik og mátt.

5/5. Tá so mín tíð er at enda,
í hesum skugganna dali,
tá skal í himmalsins sali,
betur eg syngja hans prís.